# Hugstoytt at verða tengdur at landasviki

**THORSTEINN MÁR BALDVINSSON**
stjóri í Samherji



Tað er sera hugstoytt at verða lagdur undir landasvik av føroyskum fjølmiðli. Upp aftur tyngri kennist tað at lesa, at samstarvsfelagar og vinir mínir í Føroyum, sum eg annars kenni sum hampafólk burturav, fáa sama dóm.

Í Vinnuvitan tann 3. mai verða fólk, sum samstarva við íslendskar fyritøkur sagdar at vera quislingar. Allar greinarnar á eini heilari opnu í blaðnum eru bygdar á samrøður við tveir menn. Eisini verður sama evnið tikið upp í sjálvari oddagreinini. Eingin roynd er yvirhøvur gjørd at fáa orð á tey, sum hesar grovu skuldsetingar verða settar fram ímóti.

Undirritaði setti seg í samband við blaðstjóran á Vinnuvitan og spurdi, hví blaðið ikki hevði vent sær til mín, áðrenn slíkt varð prentað. Svarið varð, at tað orsakað av tíðarneyð ikki var gjørligt.

Sjálvur eri eg stjóri í eini íslendskari fyritøku, sum hevur tætt samstarv við og er partaeigari í føroyskum fyritøkum. Sostatt skilji eg ákærurnar soleiðis, at øll tey hampafólkini, sum starvast hjá og saman við hesum fyritøkum eru Quislingar. Eg havi í eitt áramál búð í Noreg og veit, hvørjum hugtakið quislingur í dag stendur fyri.

Samband mítt við Føroyar og føroyingar røkkur heilt aftur í 1960 árini, tá pápi mín sum fiskaði undir Føroyum kom í samband við nógvar føroyingar og fekk nógvar góðar vinir í Føroyum. Sjálvur havi eg heilt frá ungum árum átt føroyingar í mínum vinaskara og eigi tað enn.

Eg havi havt sera stóra gleði av at arbeiða saman við føroyingum, og eg havi fylgt væl við í tí, sum fyrifarist er í Føroyum. Eg havi eisini heft meg við tað etiska støðið, partar av føroyskum fjølmiðlum liggja á. Her hugsi eg um, hvussu familja hjá ávísum persónum meira enn so verður drigin inn í kjak, sum snýr seg um eitt nú vinnuvirksemi hjá viðkomandi. Slíkt er óhugsandi aðrastaðni.

Til sammetingar við hetta ávísa málið, ið nú varð tikið upp í Vinnuvitan, kann eg nevna, at eg í fleiri ár gjøgnum skrivstovuvindeygað mítt havi kunnað fylgt við, hvussu ein føroyingur hevur keypt upp byggilendi og bygt á Akureyri. Øgvuliga ymiskar hugsanir eru millum fólk um tað. Stórar ósemjur, sum eru endaðar í rættinum, hava eisini staðist av hesum. Men tað hevði verið óhugsandi at farið í fjølmiðlarnar við eini slíkari viðgerð sum teirri, ið vit nú síggja í Føroyum. Í Íslandi viðgera vit ósemjur á hægri etiskum støði enn so.

Um ætlanin við hesum greinasavninum í Vinnuvitan var at raka felagið Samherja og ella meg persónliga, kann eg bara ynskja teimum, sum vildu tað, tillukku við, at tað eydnaðist. Útgávudagurin var sera væl valdur, har blaðið varð lagt ókeypis fram á North Atlantic Fish Fair og boðskapurin soleiðis verður breiddur rættiliga víða við teimum mongu vitjandi á stevnuni bæði innan- og uttanlands.

Vit, sum arbeiða við og á havinum, vita, hvussu havið broytist. Hvussu tað gevur og tekur. Tað kenna Thor brøðurnir eisini til. Eg havi djúpastu samkenslu við reiðarí og avvarðandi, sum mistu orsakað av vanlukkunum umborð á Hercules og Poseidon.

### 1. mai 2007

# Stríðshugaða fjøldin

Stóð har einsamallur
stríðsfúsi blóðreyði
nærhendis
harðmæltur greiður frá

fleiri hundrað fátæk børn
í hesum vakra landi
í landsuðuri
fleiri túsund fátækrabørn

millum tær fínu glæstrimyndirnar
heimleys í túsundatali

verða kallað vælferðarsamfeløg
bert fyri tey vælbjargaðu

tann kúgandi stættin
niðurbindur tað
kúgaðu fjøldina
við ósannindum

stættastríðið er av
greiður
tað borgarliga harkaliðið frá

nei sanniliga er stættastríðið ikki av
nústani byrjað av álvara

arbeiðarafjøldin niðurbundin
leinkjað í kapitalismunnar
oyðandi sjálvgóðsku
og privatiserings ørsku
trælir í egnum húsum
- frælsishugsjónin doyr -
ófrælsir
sleppa ongan veg

leinkjurnar níva og naga
skríggjandi pína og einsemi

meðan kapitalistisku ørindasveinarnir
yvirstættin á ferð
hagar
luksusdýrini savnast
saman við fínarimpunum
snákunum drekka vín
og flenna ein býttisligan látur

kapitalistiska skipanin
sprænur eitur kring allan heimin

vesturheimurin
tey vælbjargaðu
geva við aðrari hondini
taka fleiri túsund aftur
við hinari

kapitalismunnar trælaok
tyngir arbeiðarafjøldina niður
bæði til likams og sálar
gerast líkasæl

tænarar vorðnir yvirstætt
traðka niður á okkum
verkafólk arbeiðarastættin

draga til sín spekulantarnar
og fóðra teir væl og virðiliga

í stríðum streymi
alskyns marglæti
smábørn gráta, svølta, syrgja og pínast
hokna niður av arbeiði
fyri tann vælgødda vesturheimin

rægammarnir tevja altíð profitt
lata seg í margfaldu
spekulantahamar

jú sanniliga hevur marglætisgudurin
jól og góðar dagar
sum eitrandi soppar
kring alt landi
leinkjað arbeiðarastættin í øldir

meðan tann kúgaða fjøldin
verður eitrað
tilfeingið tikið frá henni
stendur eftir á berum

hvar er sosialisman
javnaður, brøðralag og frælsi?

hava tit tveitt hugsjónina
niður í grugguta borgarliga leypin?

vit
arbeiðarafjøldin verkamannastættin
fáa ikki eyga á hugsjónina
og so als ikki í verki

vær vónum at teir veruligu
socialistarnir
sleppa framat
og taka stýrisvøl í hond
og seta kós og sigla innar
í sosialismunnar
heiðurskrýnda land!

Vær viljum sigrað!!

Sólmundur Joensen

# Rós til ungar íverksetarar frá Føroya Handilsskúla í Havn

*Føroya Handilsskúli*

Í næstsíðstu viku luttóku fimm handilsskúlanæmingar frá Føroya Handilsskúula í Havn í árskappingini hjá Young Enterprise í Danmark. Íalt tjúgu virkir luttóku í kappingini í Industriens Hus í Keypmannahavn. Frammanundan hava 18 virkir úr Føroyum og 230 virkir úr Danmark seinastu mánaðirnar kappast um at koma til finaluna í Keypmannahavn.

Føroysku næmingarnir hava stovnað virkið Omaná, ið framleiðir og selur rabarbusuppu í fløskum. Rabarbusuppan var sera væl móttikin og næmingarnir fingu rós frá Bertel Harder, undirvísingarmálaráharra og amerikanska ambassadørinum James P. Cain.




*Greinin úr Børsen - á innsettu myndini síggjast frá vinstru Bertel Harder, undirvísingarmálaráðharri, James Cain, amerikanskur ambassadørur í Danmark og Bárður R. Poulsen frá virkinum Omaná. Grein í Børsen tann 27. apríl 2007*

# Rættleiðing til Vinnuvitan

**AHMED MOUKNASS**
On hehalf of Trawlers Management

With regards to the article about Ocean group Faroes Ltd in the newspaper Vinnuvitan on the 3th of may. I want to correct misplaced information.

• Neithe thorsteinn Már Baldvinsson or Samherji has offered me two digit in millions for my share in Ocean Group Faroes Ltd.

• Thorsteinn Már Baldvinsson came into this (because of friendship with som of the Icelanders) to offer support.

• I was not the weigt tipped sale of Athena.

• I sold my share in Ocean Group Faroes Ltd together with the Icelanders and the Faroes captain because there was no future for the company as long as the groups are not seperated.

*Mauritania May 5, 2007*